# út at koyra




## Dýrt ævintýr

Rover ævintýrið hevur kostað BMW umleið 55 milliardir krónur, frá 1994 til í dag.

**Kelda: Motor Magasinet**



## Dekk-messa í Essen

Næstan 400 framsýnarar vóru á altjóða dekkmessuni „Reifen 2000“ í Essen í Týsklandi, sum byrjaði 20. og endaði 23. juni.

**Kelda: Motor Magasinet**



## Sam-starva við Porsche

Porsche hevur menningarsamstarv við Mercedes, og sølusamstarv við Subaru. Teir keypa karrossaríir frá BMW, Mercedes og VW. Selja Tiptronic- gearkassar til Peugeot og Hyundai.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**

# Seat fingið designara frá Alfa Romeo






*Fyrrverandi Alfa-teknarin, Valter de Silva, arbeiðir nú fyri Seat…*



MAGNUS GUNNARSSON

Á bilaframsýningini í Geneve sýndi Seat nýggja konseptbilin, Salsa, sum tann sera dugnaligi teknarin, Valter de Silva, ið er komin frá Alfa Romeo, hevur teknað.

Valter de Silva hevur t. d. teknað Alfa Romeo 156, sum bleiv ársins bilur í Europa í 1998, har ein av próvførslunum var, at hann hevði eitt design, sum vakti ans millum kappingarneytarnar.

### Fýrahjólstrekk og 18" hjól

Seat hevur stórar ætlanir nú, síðan VW yvirtók fyritøkuna, um at vinna týdningarmiklar partar av marknaðinum við Walter de Silva á odda.

Nógv bendir eisini á, at Seat fer at fáa góð úrslit. Hóast Seat Salsa er eitt boð uppá ein framtíðarbil, heldur teknarin, at Salsa sum onki kann koma á marknaðin beinanvegin, tí hann er fyrst og fremst ein framkomin sportbilur - og so er hann eisini góður til langar túrar, eins og hann er vælegnaður til ferðslu í býnum.

Salsa er ein 2+2 bilur, við pláss til tvey vaksin og tvey børn.

Motorurin er ein 2.8 litrar V6 við 250 hk, við Tiptronic gearkassa frá VW, og fýrahjólstrekk.

Dekkstøddin verður 225/50-18.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**




# Volvo CUV við Focus undirvogni

*Magnus Gunnarsson*

Síðan Volvofyritøkan í fjør varð yvirtkin av Ford og kom í luksusklassan hjá Ford, »Premier Automotive Group« (PAG), hevur svenska leiðslan hugt nærri at framtíðar modellskránni saman við Ford.

Eitt úrslit av samstarvinum er, at Ford fyribils hevur slept eini ætlan um ein stationvogn til 5 ella 7 persónar, sum skuldi koma á marknaðin í 2002.

Ístaðin væntast hann at koma sum ein Volvo, ið er bygdur yvir ein Ford Focus undirvogn. Á tekningini hjá DeLusi er bilurin í 4x4 útgávuni.

**Kelda: FDM / Motor**



# út at koyra




# Toyota MR2 komin aftur íaftur

*Magnus Gunnarsson*

Flest øll í Føroyum hava sæð hendan lítla svarta sportbilin í SVF-lýsingunum hjá LM-Handilinum, ella á bilaframsýningum.

### Verkfrøðingarnir høvdu ein dreym

Fyrsti Toyota MR2 kom í 1985. Nýtt snið kom í 1990, ið varð gjørt til 1995. Tá teir góvust við at gera MR2 hildu teir uppat at gera bilin, tí hann gjørdist nakað dýrur og gav ov lítið avkast til Toyota.

Tað at bilurin er aftur her nú kemur av, at nakrir treiskir verkfrøðingar hjá Toyota høvdu ein dreym um ein lítlan kompaktan sportbil, og arbeiddu teir í roynd og veru aftan fyri ryggin á leiðsluni við verkætlanini um at gera ein nýggjan MR2.

Tá ætlanin varð løgd fram fyri leiðsluna, saman við tekningunum, gav leiðslan seg yvir, og ein nýggjur MR2 sá dagsins ljós.

### Midship Runabout 2

Tað MR2 stendur fyri er: M stendur fyri »midship engine«, R stendur fyri »runabout«*, og 2-talið kemur av at hann er ein bilur til tveir persónar.

Sjálvt um bilurin er lítil, er gott pláss til stórar persónar, og beinplássið er gott.

Leðurrættið kann stillast í hædd, og setrini eru av slagnum »Whiplash Injury Lessening« (WIL).

Endamálið við hesum setrum er at minka um vandan fyri skaða, tá bilurin verður ákoyrdur aftanífrá.

### Cabriolet, stofftak ella coupé

MR2 er ein sportbilur, sum sær væl út, koyrir væl og vekir ans, har hann kemur. Porsche Boxter hevur nokk verið fyrimyndin, tí teir líkjast bæði uttan og innan.

Bilurin kann brúkast sum ein cabriolet við ongum taki ella við stoffgalesjuni, ið er løtt at sláa upp ella niður, uttan at skula úr bilinum. Ein triðji møguleiki er at keypa ein hardtop í sama liti sum bilurin, og tá hava vit ein elegantan MR2 coupé.

Við bakhjólstrekki og motorinum í miðjuni fær bilurin gott vegtak og vektbýti.

Motorurin, ið er ein 1.8 litur, 4 syl. 16V og 140 hk, situr lágt fyri at fáa tyngdarpunktið niður.

Bilurin hevur ikki somu dekkstødd aftan og framman. Dekkini framman eru 185/55-15 við 6" felgum, og aftan eru dekkini breiðari, 205/50-15 við 6,5" felgum. Alt hetta ger, at bilurin koyrir so væl, at tað næstan ber til at stýra gjøgnum sving við speedaranum.

Bilurin kom higar sum ein framsýningarbilur, og vónandi verður hann verðandi í landinum.

*** Runabout er ein opin sportbilur, ofta við tveimum setrum og galesju**

## Toyota MR2

Motorurin
4 syl. 1.8 VVTi
bensin 16V 140 hk

0-100 km/t
8.1 sek/5 gear

bensinnýtsla
13.5 km/l

Toppferð
210 km/t

Dekkstødd
framman 185/55-15
aftan 205/50-15

Stødd og vekt
Longd 388.5 cm
breidd 169.5 cm
hædd 124.0 cm

Eginvekt
950 kg
Totalvekt
1225 kg

Viðførisrúm
90 litrar

Prísur
kr.268.000,-

Søluumboð
Reyni Service
Vegurin Langi
FO-188 Hoyvík
Telefon 313040




